# E - og tónleikur



**Edmund Jacobsen, tónleikari**

**Hann er helst best kendur sum sangari í bólkinum Chase.**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Ja, men tað bleiv sjáldan spælt upp á tey.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Ja, eitt sindur av hvørjum. Men ikki nóg væl til, at eg spæli alment.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Ja.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Alt!

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Eini 400 fløgur og 200 gamlar lp-plátur.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– »Badmotorfinger« hjá Soundgarden.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– »Aquarium« hjá Aqua.

Hvør sangur skuldi ongantíð *verið skrivaður?*
– »Omma« hjá Símun úr Konoy.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Ein hjá Shakin' Stevens, eg minnist ikki heitið.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– »Honesty« hjá Billy Joel.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Eitt sindur skeivur poppur ella rokkur: Akkurát nú er tað C.V Jørgensen: »Fraklip Fra Det Fjerne«, Baal: »The Supreme Machine«, D-A-D: »Soft Dogs«. Ella kanska okkurt klassiskt.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Sálmar.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– R&b – sovorðið sukursøtt tvætl!

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Gloria Gaynor og »I Will Survive«.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– Sangurin æt »Holiday«, men eg minnist ikki, hvussu bólkurin æt.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
– »7 míl frá Hollywood« saman við Chase.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– »Happy Trails« hjáVan Halen.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– D-A-D í Esbjerg, februar 2002. Eg havi ongantíð upplivað nakað nær námind!!

H*vønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– David Coverdale.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Bartal N. Poulsen, Boston, bartal@mit.edu
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## »The Columbia is lost«

Tað er løgið, hvussu heimurin broytist. Mannarættindum og friði kanst tú berjast fyri í øldir uttan at nakað hendir, og samstundis eru løtur, har alt broytist eftir einum brotparti av einum sekundi. Veruleikin, tú kendi í gjár, er søga, og ein nýggjur valdar. Amerikanarar hava merkt hesar brádligu broytingar áður, og leygardagin vaknaði USA so aftur til eina nationala vanlukku. Meðan vraklutir regnaðu av himni í Texas eftir at rúmdarferjan Columbia var brend upp á veg til jarðar, gekk eg eitt sindur súrur og leitaði eftir tí einu fjølini, ið var farin til stroks stutt eftir, at eg við stríð var sloppin av lyftuni á 4.000 metra høga fjallinum Mt. Crystal tætt við Seattle, Washington. At eg allan dagin í lukkuligari óvissu skiftivís royndi at koma á føtur aftur eftir eitt minni væleydnað sneið, og av øllum alvi royndi at fáa tamarhald á ferðini á fjalunum, ið høvdu hug at ferðast skjótari enn eg føldi meg føran fyri, ger bara kensluna løgnari. Føroyingar høvdu flestallir hoyrt um Columbia kl. 17, etið náttverða, enn einaferð kl. 18.30 fingið tíðindi um vanlukkuna, verið í býnum, og síðan sovið í fleiri tímar, áðrenn eg nakrantíð frætti, hvat var á vási. Heimafturkomin aftaná ein langan og strævnan dag á fjalli, settist eg í sofuni við einari øl og tendraði sjónvarpið. Tá hevði vælsmurda amerikanska fjølmiðlamaskinan verið í holt við nýggjastu sensatiónina í fleiri tímar.

At tað hesaferð var talan um eina vanlukku, og ikki yvirgangsatsókn, tóktist ikki at gera tann stóra munin. Sjónvarpsrásirnar vístu myndir úr lítlu býunum í Texas, ið brádliga vóru vorðnir nýggja "ground zero", tøgnin, ið larmaði úr hátalarunum í kontrollrúminum á Johnson Space Center í Houston ekkóaði í hvørjum heimi í USA, og Bush forseti royndi enn einaferð at koma við uggandi orðum til tjóðina. "The Columbia is lost. There are no survivors". Bløðini, ið vóru til keyps tíðliga seinnapartin, vóru stúgvandi full av greinum um "Columbia", tey sjey fólkini, ið vóru við, hvussu rúmdarferðir vanliga ganga fyri seg, og hvat møguliga kann vera hent. Tað var næstan, sum um greinarnar hava ligið klárar, í so fall at okkurt skuldi hent. At alt var skrivað niðurfyri, og nú var bara at draga upp úr skuffunum. Man ein rúmdarferja hava ein svartan kassa? Eg veit ikki, men ein tílíkur hevði uttan iva komið væl við í kanningararbeiðinum.

Leygardagin leitaðu tankarnir hjá mongum aftur til hin dagin í 1986, tá ið rúmdarferjan Challenger sprongdist stutt eftir fráferð. Eisini hesaferð fórust 7 mannalív. At sjey studentaskúlanæmingar doyðu í einum skriðulopi bert 3 tímar seinni fekk ikki so nógva rúmd í miðlunum, men tað er sjálvandi avmarkað, hvussu nógvum vanlukkum pláss kann vera fyri í einari tíðindasending. Eg skammist ikki yvir at siga, at leygardagurin var ein tann besti dagurin eg havi havt í langa tíð, á skí saman við góðum fólki. Tað síðsta í huganum á mær var ein vanlukka, ið hendi 60 km uppi yvir Texas, men allíkavæl hevur onkur blaðstjóri ella sjónvarpsmaður gjørt av, at tað eru tíðindini, eg skal hugsa um teir næstu dagarnar. Tíverri er ikki rúm hesaferð fyri unglingunum, ið doyðu í kavanum bert 100 km higani.

Eg havi gjørt av, at fjølmiðlarnir sleppa ikki at oyðileggja mær henda annars so væleydnaða leygardagin.

Annars er alt um at verða gerandisdagur aftur hesumegin Atlantshavið. Fimbulveturin, ið hevur ligið um alla eysturstrondina, er um at taka seg aftur, og skúlin fer at byrja aftur fyrsta dagin. Fyrr í vikuni sá eg Stillahavið á fyrsta sinni. Á at líta tykist tað ikki stórt øðrvísi enn tað so vælkenda Atlantshavið. Eins illfýsið og kalt. Um hugt verður heilt væl, er tað møguliga eitt sindur bláari, men ikki nakað stórvegis. Nú ein lestrarhálva er farin afturum, havi eg roynt at hugsa eitt sindur um, hvussu fyrsta hálva árið hevur roynst. Eg minnist ikki, hvat eg væntaði mær, áðrenn eg fór úr dunnuhylinum har heima, men eg havi so ikki sæð nakað til tað enn. Tað er sum við havinum, tú hevur allar tær ymsu myndirnar í høvdinum av, hvussu tað eigur at vera, men í veruleikanum skalt tú hyggja gjølla áðrenn tú sært mun á. Fordómar og ræðumyndir eru gjørd til skamma. Veruleikin í dag er tann, at munurin á einum bostonbúgva og einum føroyingi ikki er so stórur sum fólk vilja vera við; men kanska veruleikin er ein annar í morgin.



# Løgmaður vil hava fulla greiðu á hvat Annlis hevur gjørt

**Løgmaður fer nú at kanna málið til botns um, hvat fór fram, tá Annlis Bjarkhamar skúgvaði tilmælið hjá setanarnevndini til viks, tá ið hon setti landsantikvarin. Løgmaður hevur ikki gloymt tað, sum fór fram í Løgtinginum herfyri og hereftir fer hann tí at verða nógv skjótari at leggja seg út í, hvussu landsstýrismenn umsita sítt starv**

ALMENN STARV
*Áki Bertholdsen*

Løgmaður vil hava fulla greiði á, hvat fór fram, tá ið Annlis Bjarkhamar setti Steffen Stumman Hansen í starvið sum landsantikvarur.

Tað gjørdust greitt eftir løgtingsfundin nú fyri eini løtu síðani.

Hóast setanarnevndin, ið skuldi gera tilmæli um starvið, tvær ferðir einmælt mælti Annlis Bjarkhamar til at seta Símun Arge í starvið, gjørdi hon kortini av at seta danan, Steffen Stumman Hansen, í starvið. Tað hevur vakt ans og í Løgtinginum í dag, vildu bæði Heðin Mortensen og Katrin Dahl Jacobsen hava at vita, hvat Løgmaður ætlaði at gera við málið.

Heðin Mortensen vildi hava at vita, um Løgmaður metti, at rætt var farið fram og um hann ætlaði at kanna málið, tí eftir tí, sum varð komið fram, kundi talan vera um eina politiska starvssetan.

Hann vísti á, at uttanum vanliga mannagongd, og uttanum setanarnevndina, hevði Annlis Bjarkhamar havt setanarsamrøðu við umsøkjarnarnar.

Løgmaður svaraði, at tað er rætt, at almenni setanarpolitikkurin er ikki fylgdar í hesum føri.

Hann segði, at tað er ógvuliga umráðandi, at rætt verður framfarið, so at øll, sum søkja, bæði tey, sum fáa starv og tey, sum ikki fáa eitt starv, ikki kunnu seta ákærur fram um at ikki alt er rætt framfarið.

– Tí er tað, sum er farið fram í sambandi við landsantikvarin, sera, sera harmiligt, keðiligt og skaðiligt, og Løgmaður fer tí at taka sær av málinum so at full greiða kann fáast á, hvat er farið fram.

– Tað er neyðugt, at ongin kann sáa iva um setanarpolitikkin legði hann afturat.

Heðin Mortensen takkaði løgmanni fyri, at hann tekur málið upp, men heitti kortini á Landsstýrismálanevndina um at taka málið upp.

Kristina Háfoss vardi floksfelaga sín og gjørdi greitt, at onki løgfrøðiliga skeivt var farið fram, tí tað er landsstýrismaðurin, sum setir starvið og tað ikki uttan grund at tað eitur innstillingarnevnd.

Tað var týðiligt, at løgmaður sipaði til málið um Jørgen Niclasen, tá ið hann svaraði Kristinu Háfoss aftur:

– At onki skeivt er farið fram løgfrøðiliga havi eg hoyrt av tingsins røðarapalli fyri ikki so langari tíð síðani.

– Men ivi er sáddur um starvssetanina og tað havi eg eisini hoyrt frá tingsins røðarapalli.

Og so legði hann afturat:

– Løgmaður hevur tikið til eftirtektar tað, sum fór fram í tinginum fyri eini tíð síðani, so hann verður munandi skjótari at leggja seg út í umsitingina hjá landsstýrismonnum hereftir, enn hann hevur verið.
– Og hetta er í hvussu so er eitt av teimum málum, har Løgmaður fer at leggja uppí beinanvegin, segði hann.
Við stýrisskipan
arlógini í hondini, vildi Katrin Dahl Jaobsen hava at vita um Løgmaður metti, at ein landsstýrismaður hevur umsitið sítt málsøkið á fullgóðan hátt, tá ið hann hevur kallað inn ein umsøkjara til samrøðu, uttanum setanarnevndina, eftir at setanarnevndin tvær ferðir hevði mælt til at seta sama umsøkjara í starv.

Løgmaður svaraði at orsøkin til at hava eina setanarnevnd, var júst fyri at fáa tann best skikkaða umsøkjaran í eitt starv og tí skuldi nevndin vera sett soleiðis saman, at hon kundi taka bæði faklig og umsitingarlig og onnur atlit.

Hann visti onki dømi um, at setanarnevndin kallar umsøkjarar til samrøðu í fleiri umførum.

– Og eg veit so slett onki dømi um, at ein landsstýrismaður aftaná hevur kallað umsøkjara til samrøðu.

Løgmaður sigur, at landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina av setanarnevndini og at áðrenn setanarsamrøðurnar við umsøkjarar byrja, eigur landsstýrismaðurin at hava gjørt greitt, hvørjar eginleikar, tann, sum verður settur í eitt starv, skal hava.

– Kemur landsstýrismaðurin so aftaná til ta niðurstøðu, at útgangsstøðið hjá setanarnevndini, var ikki tað rætta, hevur hann verið ov seinur á sjóvarfallinum.

– Og tá er tað øgiliga skjótt at fáa mistanka um, at tað ikki bara eru tey fakligu atlitini, sum hava vigað.

Løgmaður segði, at bara tað, at hesin ivin verður sáddur, er ógvuliga demoraliserandi.

– Tí mugu vit royna at koma aftur á beint so at ein og hvør, sum søkir eitt alment starv, kann verða vísur í at fáa eina rættvísa viðgerð, segði Løgmaður.

Hann segði, at tað undraði hann at ein faklig nevnd, sum varð sett at gera eitt tilmæli um, hvør skuldi havca starvið, tvær ferðir kemur til somu niðurstøðu, men at landstýrismaðurin, sum ikki er fakmaður, kortini kann koma við góðum grundgevingum fyri at seta annan umsøkjara í starv.

– Tað krevur eina ótrúliga góða frágreiðing og tað frágreiðingina vil eg fegin hava, segði løgmaður.

Viðmerkjast skal eisini, at landsstýrismaðurin sjálvur, Annlis Bjarkhamar, hevði forfall og var tí ikki á tingfundi.

# Samstarv



*Stjórarnir á Føroya Handilsskúla og Robert Gordon University undirkriva søguliga avtalu.*
*Mynd: Jens K*

Í gjár varð samstarvsavtala millum Føroya Handilsskúla og Robert Gordon University í Aberdeen undirskrivað í Havn. Føroya Handilsskúli hevur í eitt gott ár havt samstarv við skotska universitetið. Nú meta so báðir skúlar, at tíðin er búgvin at fara inn í eitt meira skipa samstarv um útbúgvingar á hægri stigi. Ætlanin er ikki einans at bjóða fram hægri útbúgvingar í Føroyum men eisini í Grønlandi og Íslandi sum fjarlestur. Í gjár undirskrivaðu stjórarnir á skúlunum báðum eina samstarvsavtalu.

## Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara, og sum í ávísan mun eisini kann átaka sær leiðsluuppgávur.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum. Kundarøkt, account-managemement og telemarketing eru eisini arbeiðsuppgávur, sum vit framyvir koma at leggja enn størri dent á, og kemur starvið eisini partvíst at fevna um hesi øki.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir planlegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú sjálvandi eisini vælkomin at seta teg í samband við Jákup Mørk, fíggjarleiðara, á tlf. 311820. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jakup@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin er 25. februar, og skal umstóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Jan Müller**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.




## Lærari

Fyri lærara í barnsburðarfarloyvi søkja vit eftir lærara til Sands skúla 19 tímar um vikuna frá 12. mars 2003 til 1. januar 2004.

Nærri upplýsingar um starvið fáast frá fyrstalæraranum á tlf. 361647 ella 161127.

Umsóknir við próguvm og møguligum viðmælum skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 23.2.2003.

**Skúlastýrið fyri Sands skúla**
att.: Anna Horn
210 Sandur




